## Veðrið ikki alt at siga

**Summar festivalurin 2005 setti met og omanfyri 8000 fólk savnaðust um tónleik og hugna. Fyrireikararnir meta, at hetta helst er størsta mannfjøld í Norðoyggjum nakrantíð**

SUMMAR-FESTIVALUR 05
*dagfinn@sosialurin.fo*

Fyrireikararnir av Summar Festivalinum eru væl nøgdir við tiltakið um vikuskiftið. Eini 8000 fólk vóru á festivalinum og er tað met og harvið størsta tónleikatiltak í Føroyum nakrantíð.

- Eg haldi eg tori at siga, at hetta er størsta mannfjøld í Norðoyggjum nakrantíð. Vit eru nøgd við, at so nógv vitjaðu, men tað hevur eisini nógv at siga, at alt gekk friðarliga fyri seg. Fáar fráboðanir vóru til løgreglu og sjúkrahús og stjørnurnar komu, gjørdu sítt og sluppu avstaðaftur í øllum góðum, sigur ein av fyrireikarunum, Steintór Rasmussen.

**Læruríkt**

Hann metir eisini, at festivalurin í ár var læruríkur, tí tað er nú prógvað, at veðrið hevur ikki alt at siga. Tað var nevniliga regn og sirm stóran part av fríggjadegnum og leygardegnum, men leygarkvøldið gjørdist eitt sindur betri og sunnudagin skein sólin.

- Tað er sjálvandi heppið hjá teimum, ið hava ligið í tjaldi og hjá teimum, ið eru komin í báti, sigur Steintór.

Hann fegnast um, at so nógv leitaðu sær til Klaksvíkar, men er líka fegin um, at fólk hugnaðu sær, at alt gekk væl og at fólk lata væl at og at fleiri longu nú gleða seg til næsta Summarfestival.

# Blómur frá Hanusi

**Síðsta navn, sum kom á festivalskránna, var Hanus G. Johansen. Tað kom so seint, at tað kom ongantíð í prentaðu skránna, men tó fegnaðust mong og tað var eisini ein stór fjøld, sum savnaðist um lítla pallin, tá Hanus fór á pallin**

SUMMAR-FESTIVALURIN 05
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Nógv fólk nýttu høvið at hoyra Hanus G. Johansen, sum fór á lítla pallin á Summarfestivalinum. Hanus eigur evnini at raka beint, tá hann ger løg, og føroyingar hava tí tikið hann til sín.

Hanus hevur spælt seg so beint inn í føroysku fólkasálina. Og nógvar føroyskar sálir savnaðsut eisini kring lítla tjaldið við stóra troubadourinum.

Og hann kvittaði við teimum mongu sangblómunum, ið hann hevur á síni skrá, og tí gjørdist hetta ein góð løta, har vit aftur sluppu at hoyra Hanus, sum annars ikki hevur verið nógv frammi í eina tíð.

**Eyðun og Terji**

Eyðun og Terji áttu tørn á pallinum í tjaldinum. Har var eisini sera nógv fólk komið saman at hoyra hesar báðar, sum bæði saman og hvør í sínum lag hava skrivað so nógvar sangir, sum eru vorðnir fólkaogn.

Og teir báðir eru millum royndastu og virknastu tónleikarararnar og skuffaðu heldur ikki á Summar Festivalinum.


*Hanus hevur spælt seg so beint inn í føroysku fólkasálina*

# Brandgóð konsert í tjaldinum

**Brandur Enni fór á Flagspallin í stóra tjaldinum á Summarfestivalinum. Og hann er ein barnastjørna, sum er vaksin við uppgávunum og gávunum, og er í dag ein dugnaligur unglingi, ið er betri enn nakrantíð**

SUMMAR-FESTIVALURIN 05
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Tað hevur verið stilli kring Brand Enni í eina tíð. Hann fór á pallin á Summarfestivalinum og hetta gjørdist ein rættiliga góð konsert.

Ragnhild Ellingsgaard kom á pall og greiddi frá um Brand og um nýggju ætlanirnar, ið m.a. fevna um, at Brandur nú fer til Svøríkis í upptøkuhøli har.

Tjaldið fyltist skjótt av bæði yngri og eldri lurtarum. Brandur legði fyri við einum lag, sum er sett til orð hjá Pól F. Joensen. Tað er Hanus G. Johansen, ið hevur gjørt lagið, men hetta er ikki eitt lag, sum er kent millum manna. Tað er við heitum rútmum - calypsokent - og riggaði stak væl og eitur Lívið er sum eitt kertuljós.

Brandur Jacobsen, Eyðun Nolsøe, Bjarki Meitil og Tróndur Enni leiktu undir hjá Brandi Enni og á skránni vóru løg hjá Tim Christensen, Deep Purple og so sjálvandi tey mongu løgini, sum vit kenna frá Brandi sjálvum, so sum Heimið og Perfect Summer. Tað riggaði væl hjá manningini og hjá Brandi og eisini ljóðið í tjaldinum var gott og gjørdi hetta til eina góða konsert.


*Tað riggaði væl hjá manningini og hjá Brandi og eisini ljóðið í tjaldinum var gott og gjørdi hetta til eina góða konsert.*

# Dynamitt endaðu við einum braki

**Tað var roykur og fýrverk, tá Dynamitt fór á pall sum síðsti bólkur á Summarfestivalinum. Teir siga hetta var teirra síðsta framførsla**

SUMMAR-FESTIVALURIN 05
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Nógvur roykur og eyðkenda útvarpsrøddin hjá Fróða Løkságarð byrjaðu framførsluna hjá Dynamitt. Greitt varð frá um uppfinnaran Nobel, og so um tað hann uppfann; Dynamitt.

So kom ein orkufull framførsla, har løg sum Eia Umba (ella hvussu tað nú stavast), Omman við Gjógv, Tú er bangin, Gev mær eina øl og so okkurt stillari lag komu í eini sannari hittrøð.

Grøv nummar 13 var so eykalag, tí tað vildi kókandi fjøldin hava frá hesum bólkinum, sum nú tóktist meira professionellur, enn nakrantíð fyrr.

Og meðan fjøldin sang; Vit vilja ongantíð doyggja, endaði framførslan hjá Dynamitt, meðan størfingið festivalfýrverk setti punktum fyri Summar Festivalin 05.